# Lastbilar lítið at gera

Donsku flutningsfeløgini, sum hava dúvað upp á at flyta vørur við lastbili, hava munandi minni at gera nú enn fyri bara nøkrum mánaðum síðani. Ein uppteljing vísir, at lastbilaferðslan millum Danmark og grannalondini Týskland og Svøríki er minkað 10 prosent samanborið við oktober-ársfjórðing í fjør og 16 prosent samanborið við tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í 2008. Uppteljingin vísir eisini, at bara 21 prosent av øllum lastbilunum, sum komu ella fóru um markið tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár, vóru skrásettir í Danmark. Næstan 44 prosent vóru týskir, og góð 19 prosent vóru úr londum í Eysturevropa.




# Aftur á svartkjaft

Íslendska reiðaríið HB Grandi gjørdi um vikuskiftið av at senda tey trý uppisjóvarskipini, sum felagið eigur, at leita eftir svartkjafti. Ingunn fór avstað í gjár, og ætlanin var, at Faxi og Lundey skuldu fara í morgun. Íslendsku skipini vóru á svartkjaftaleiðini nakað vestan fyri Írland í síðstu viku, men fóru heim, tí svartkjafturin hvarv. Skipini hjá HB Grandi hava fiskað góð 13.000 tons av svartkjafti higartil í ár og hava smá 11.000 tons eftir av kvotuni. Vanliga tekur svartkjaftaveiðan seg upp vestan fyri Írland, og haðani fer svartkjafturin norðureftir og kemur seinni í føroyskan sjógv.

*Framleiðsla av betongelementum er nýtt virkisøki hjá Løvubetong, og tað, sum skapar flestar arbeiðstímar*



hevur verið rættiliga nógv innflutt av hesum byggimateriali seinastu árini, og tað er har, vit ætla at taka kappingina upp. Og har hava vit tann fyrimun, at fraktin av betongelementum er sera dýr, sigur Regin Johannesen.

Hinvegin mugu teir so eisini flyta alla rávøruna til framleiðsluna inn.

- Ja, vit mugu siga, at betongframleiðsla í Føroyum er lutfalsliga dýr samanborið við grannalondini hjá okkum, tí vit flyta inn bæði betong, sand og skerv. So øll rávøran kemur uttanlands frá, sigur Regin Johannesen.

Tað kann ljóða eitt sindur løgið, at tað er neyðugt at innflyta sand, men tað hevur eisini sínar orsøkir.

- Tað er roynt at stoypa við sjósandi fyrr, men tað hevur ikki verið við góðum úrsliti. Tað er saltinnihaldið og vøkstur í sandinum sum ger, at hann ikki er væl egnaður til betong, sigur Regin Johannesen.

Betongelement framleiðslan er ikki so gomul á virkinum, men teir hava kortini havt stórar kundar, og í løtuni er tað Valbjørn Dalsgarð á Hamrinum á Argjum, sum er størsti kundin.

- Vit hava eisini latið onkra høll og onkra sethúsagrund, so tað er eitt sindur av hvørjum, sigur Regin Johannesen.

## Fleiri uppgávur til kranan

Stjórin á Løvubetong heldur ikki, at byggivirksemið í Føroyum í løtuni er so ógvuliga stórt.

- Nei, eg haldi ikki, at tað verður líka nógv bygt í løtuni. Hinvegin eru nógvir fyrispurningar, so tað eru nógv fólk, sum ætla sær at byggja, sigur Regin Johannesen.

Nú er heldur ikki rætta árstíðin til bygging. Vetrarnir eru altíð trekir til betongsølu, og stjórin á Løvubetong heldur ikki, at hesin veturin hevur verið so nógv øðrvísi enn aðrir vetrar.

- Hinvegin vænti eg, at tann stóri upptúrurin, sum vanliga kemur um sumrarnar, verður ikki tann sami í ár, sigur Regin Johannesen.

Nýggja betongelement framleiðslan hevur eisini ført til, at stóri flytbari kranin verður meiri nýttur av virkinum sjálvum, tí so at siga øll elementir, sum Løvubetong nú leverar, verður sett upp við hesum krananum.

Hann hevur tó eisini aðrar uppgávur, og tað kann næstan verða alt millum himmal og jørð.

- Alt, sum er tungt, er ein uppgáva fyri kranan. Tað kann verða alt frá betongelementum til motorar, sum skulu setast í skip. Hann hevur nógvar uppgávur, sigur Regin Johannesen um kranan hjá virkinum.

Summarhálvárið er sum vera man strævnasta tíðin, og tá kunnu arbeiðsdagarnir stundum gerast langir. Tí hevur virkið í fleiri ár havt eina skipan, har ein kokkur ger mat til starvsfólkið, so tey fáa døgurða hvønn dag.

- Hetta er ein gomul skipan, sum er komin í lag fyri lættari at kunna halda fólki til, tá dagarnir gerast heldur langir, sigur Regin Johannesen.

## Fleiri bein at standa á

Løvubetong hevur nú fýra bein at standa á, og eitt av hesum er søla av óblandaðum betongi.

- Vit hava ikki nakað einaumboð upp á betongið, men vit eru teir einastu, sum flyta inn í stórum nøgdum. Betongið kemur alt frá Aalborg Portland. Tað verður alt flutt inn í leysum, og vanliga koma skip her við 2.000-3.000 tonsum av betongi í senn. Tað verður so pumpað gjøgnum rørleidningar niðan í tangar, har tað verður goymt. Síðani verður tað koyrt út til kundarnar í tangabilum, sigur Regin Johannesen.

Kundarnir til hesa vøruna eru stóru byggifeløgini í Føroyum, sum øll, uttan undantak, keypa sítt betong frá Løvubetong.

- Tað er nevniliga soleiðis, at okkara størstu kundar eisini eru okkara størstu kappingarneytar, sigur Regin Johannesen.

Nýggja elementframleiðslan hevur gjørt, at virkið hevur heldur fleiri fólk í arbeiði, enn teir hava havt, og í løtuni starvast 15 fólk á Løvubetong.

Tað er elementframleiðslan, sum skapar flestar arbeiðstímar á virkinum.

- Ja, tað skal ikki so nógv til at blanda betongið og koyra tað út. Øll blanding fer fram á teldu, og kann fyri tann skuld gerast heimanífrá. Heldur ikki kranin krevur meiri enn tann eina mannin, meðan vit eru einir fimm til átta mans í elementhøllini, sigur Regin Johannesen.

Hann er rættiliga bjartskygdur um framtíðina.

- Fyrispurningarnir eru nógvir, og sjálvt um vit ikki vænta stóra uppsvingið, sum vanliga er um sumrarnar. Vit kunnu kanska rokna við einum róligum ári í ár, men tað skal nokk koma ferð á aftur, sigur Regin Johannesen, stjóri á Løvubetong.



*Virkið byrjaði við at blanda betong og koyra tað út til kundar sínar, og tað er framvegis eitt av týdningarmiklu beinunum hjá virkinum*